# Menn skulu tora

**– Modernaði maðurin er ein kventil. Hann gongur í inniskóm fyri ikki at dálka gólvini, og hann situr og pissar. Feminisman hevur gjørt mannin til tað veikara kynið, staðfestir danin Mads Christensen, sum nú hevur lagt lunnar undir maskulismuna, sum er eitt nýtt rák, ið skal forkoma metrosexualitetinum**

– Modernaði maðurin er uppvaksin við sterkum kvinnum, sum reistu seg frá grýtunum og kravdu útbúgving, arbeiðslív, karrieru og sjálvsrealisering. Og taka vit filmarnar, sum vit hava sæð í uppvøkstrinum, so hava teir fyri tað nógva snúð seg um kúgaðar menn og sterkar britur, t.d. Olsen Banden, Far til fire og Fawlty Towers. Hetta hevur avgjørt sett síni spor!

Orðini eigur Mads Christensen. Hann er eitt kent navn í Danmark, og hann er ikki vanur at leggja fingrarnar ímillum. Tað ger hann heldur ikki í síni triðju bók, sum kom út nakað fyri jól, og sum eitur " Blærerøven vender tilbage". Ì bókini ger hann púra greitt, at dagsins mannfólk hava mist alla virðing fyri sær sjálvum, og úrslitið av tí er, at eisini kvinnurnar missa alla virðing fyri teimum.

### Kvinnur vilja hava sterkar menn

Í 10.000 ár hevur maðurin verið tað sterka kynið. Hann hevur sagt, hvar skápið skal standa, og hevur so at siga verið einaráðandi. Men seinastu 50-60 árini er myndin koppað, og nú er tað brádliga kvinnan, sum er við yvirlutan. Tað er tó ikki eitt fyribrigdi, sum brádliga er komið av sær sjálvum, men við árræði, vilja og málrættaðari kós hevur kvinnan vunnið frama í øllum lívsins viðurskiftum.

– Tað eru sjálvsagt nógvar orsøkir til, at kvinnurnar eftir so stuttari tíð hava megnað at bróta 10.000 ára gamla mynstrið. Men eg haldi, at feminisman er størsta orsøkin. Feminisman hevur fingið stórsligin úrslit, men man kann ikki gera eggjakaku uttan at bróta nøkur egg, og í hesum førinum er tað modernaði maðurin, sum er komin í klemmu, vísir Mads Christensen á í nýggjastu bók síni.

Hann er ivaleysur í, at besta samspælið ímillum kynini kemur, um tú hevur tveir javnbjóðis partar, sum megna at geva hvørjum øðrum mótspæl og tora at taka nakrar samanstoytir. Hetta er orsøkin til, at hann hevur byrjað eina nýggja rørslu, sum skal vera eitt mótspæl til feminismuna. Hon hevur fingið heitið maskulisma.

– Endamálið við maskulismuni er ikki, at kvinnan aftur skal vera kúgað. Eg orki bara ikki at síggja hesar menninar, sum ongantíð tora at siga nei. Sum ganga í inniskóm fyri ikki at dálka gólvini, og sum ikki tora at standa og pissa, tí konan ikki vil, sigur Mads Christensen.

– Maskulisturin gleðist um, at tað gongst kvinnuni væl, og at hon hevur framgongd. Men ístaðin fyri at undirkasta seg og lata seg í inniskógvar alt fyri eitt, so er maskulisturin ikki bangin fyri at taka bardagan upp og geva aftur av somu skuffu. Kvinnur vilja hava sterkar menn. Og um maðurin er sterkur, so klárar hann eisini at hava eina sterka kvinnu, uttan at missa seg sjálvan burtur. Hetta er ein klassisk win-win situation, staðfestir Mads Christensen.

### Metro-maðurin eitt misfostur

Men áðurnevnda win-win situatiónin kann bert koma, um modernaði maðurin aftur gerst ein rættur maður, og torir at geva kvinnuni og feminismuni mótspæl.

– Tað, sum altíð hevur eyðkent ein rættan mann, er integritetur og autoritetur. Men tað hevur modernaði maðurin ikki. Tak til dømis metro-mannin, sum tey rópa hetta nýggja misfostrið. Eftir mínum tykki er ein maður, sum nýtir longri tíð framman fyri spegilinum enn konan, og sum nýtir fleiri pengar uppá krem og smyrsl enn mamman, komin út á ein alvorliga skeivan síðuveg, slær Mads Christensen fast.

Ein av orsøkunum til, at dagsins maður er ein slíkur kventil er, at hann, so hvørt sum kvinnurnar eru vorðnar sterkari, hevur mist sín samleika. Hann hevur undirkastað seg og hevur latið myndugleikan frá sær, vísir Mads Christensen

Og við ongum samleika dugir Mads Christensen væl at síggja, at tað kann vera torført at standa ímóti metro-bylgjuni og undirbrottligheitini. Kvinnurnar trýsta mannin inn í ein krók, og menninir, sum hava mist sín samleika og autoritet, tora ikki at siga sláa nevan í borðið og siga nei. Hóast tað kanska er tað, sum kvinnurnar í grundini ynskja.

– Eg havi havt ta gleði at tosað nógv við Suzanne Bjerrehus, og hon hevur sagt mær, at hon hvønn einasta dag biður mannin lata seg úr útiskónum og í einar inniskógvar, tá hann kemur heim, fyri at hennara hvítu gólv ikki skulu gerast skitin. Hann hevur framvegis ongantíð lurtað eftir henni, og hon viðgongur eisini, at tann dagin hann kemur inn til hana í inniskóm, missir hon alla virðing fyri honum.

– Og tað er júst hetta, sum metrosexuellu menninir ikki hava skilt. Teir halda, at um teir bara gera alt, sum kvinnan sigur, so man fara at vera í lagi. Men tað er ein stór bjarnatænasta fyri bæði kvinnuna og mannin sjálvan, slær Mads Christensen fast.

Menn skulu tora at standa og pissa, og metrosexuella misfostrið skal manast í jørðina sum skjótast - sambært danska høvundanum.

### Retro-maðurin

- Misskil meg ikki. Eg eri ikki manschauvinist, eg havi størstu virðing fyri kvinnum og vil ikki hava, at kvinnan skal kúgast, ella at maðurin bara skal siga nei fyri at siga nei. Men eg vil hava javnvág í kynsrollurnar aftur.

Mads Christensen heldur avgjørt, at kynini í felag skulu gera húsligu uppgávurnar, og at maður og kona skulu skiftast um at fara upp við grátandi børnum um náttina. Hann heldur eisini, at tað er í lagi, at menn lata seg í við stíli og brúka nógvar pengar uppá ur, skógvar og klædningar. Tað skal bara vera uppá ein maskulinan máta.

– Vit mugu taka autoritetin og myndugleikan aftur. Vit mugu tora at siga nei, um tað er tað, vit í veruleikanum meina, og leggja hendan kventrasliga leiklutin frá okkum. Tí ein maður, sum ongantíð sigur NEI, verður uttan iva noyddur at bakka gjøgnum alt lívið, og einum slíkum manni er tað eingin, sum orkar at liva við. Minst av øllum hann sjálvur, slær Mads Christensen fast.

Hann vil skifta metro-mannin um við retro-mannin. Retro-maðurin er ein nýggj útgáva av góða, gamla, sterka manninum, sum var fullur av autoriteti og integriteti. Sum ikki var bangin fyri at skera ígjøgnum, og sum ikki var bangin fyri at sveitta av og á. Retro-maðurin ræðist ikki sterkar kvinnur, men sær tær heldur sum eitt gott og sunt mótspæl.

– Eg trúgvi, at tað ber til at fáa rættað kynsrollurnar aftur. Men eins og feminisman náddi sínum úrslitum við málrættaðum stríðið, so er tað eisini vegurin fram fyri okkum menn. Við mínum bókum um "Blærerøven" og við eini virknari maskulismu, fara vit nokk at fáa retromannin aftur skjótt. Og tað verður til gleði fyri øll.

*kelda: Blærerøven vender tilbage*

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*
*Mynd: Sunva Eysturoy Lassen*
*Styling: Royal Hárfríðkan*
*Klæði metromaðurin: Jack n' Jones*